DAGSINS MEINING

Gleðiboðskapur og deyðarevsing

Jólini eru við at fara aftur um bak, og vit eru við at stíga inn í eitt nýtt ár. Kortini hoyrir gleðiboðskapurin um Jesus føðing ikki bara jólunum til. Hann er til okkum øll og til alla tíð. Tó er ymiskt, hvussu vit útleggja henda boðskap. Nettupp tí at hann er so stórur og fevnir so víða ber til hjá hvørjum einstøkum at ogna sær hann ella partar av honum. Her er so nógvur lívsvísdómur, næstrakærleiki og andaligt innihald, at gerandisdagurin røkkur ikki til, skulu vit fara niður í hvønn smálut og út í hvønn krók í kristniboðskapinum. Men tað góða er, at vit bara við at ogna okkum ein part av honum gerast so nógv ríkari. Í jólablaðnum tosaðu vit við prest um kristniboðan og kom fram, at eitt tað størsta í boðskapinum, sum Jesus lat víðari til okkum, er dupulta kærleiksboðið: ger móti øðrum tað, tú vil hava, at onnur skulu gera móti tær!

Í sama blað var sera viðkomandi grein um deyðarevsing. Forkvinnan hjá Amnesty nam í við mannarættindini í heiminum í dag og fanst at deyðarevsingini í USA serliga. Hóast landið altið talar at, tá tað ræður um brot á mannarættindini í øðrum londum, fremur hetta "Gods own country" størsta brotið á mannarættindini, ið finst og sum er í fullkomnari andsøgn við tað vit annars hoyra um í Jólaevangelienum, um næstrakærleika, virðing og toleransu. USA tekur menniskju av døgum fyri brotsverk tey hava framt. Hóast deyðarevsing ikki er fyribyrgjandi í sær sjálvum og hóast alsamt fleiri dømi eru um, at tey, sum verða dømd til deyðis, ikki fáa nóg góða advokathjálp og hóast mong av brotsverkunum verða framd av fólki, sum eru sosialt illa fyri sum samfelagið hevur slept uppá fjall, og hóast tey eru ungdómar og menningartarnað, er almenni politikkurin at sleppa sær av við hesi fólk sum skjótast.

Amnesty ger eitt veldugt arbeiði fyri at stegða deyðarevsing. Og tøkk skulu tey hava fyri tað. Broytingar hómast eisini so spakuliga í hugburðinum hjá amerikanarum. Tíverri hevur USA ein forseta, ið er ein av dyggastu talsmonnunum fyri deyðarevsing. Og vit eiga ikki at gloyma, at eitt tað mest óhugnaliga við framgongdini hjá Bush er tað vald hann hevur fingið at velja nýggjar dómarar í Hægstarætt. Staðið, har illa vardi og sosialt illa stæddi meinigi amerikanarin átti at kent sum sín seinasta skansa. Hesin evsti dómstólur, ið eigur at tryggja demokratisku rættindini hjá øllum borgarum uttan mun til kyn, aldur, trúgv, húðalit ella politiska áskoðan, er lutvíst í hondunum hjá einum av trúgvastu forsprákarunum fyri deyðarevsing og øðrum mannavondum tiltøkum. Við sínum meiriluta kann Bush velja sínar egnu dómarar í Hægstarætt og harvið tryggja, at hesin so tyðandi stovnur, ið átti at verið tað nærmasta tú komst Guds lóg á jørð, kann vera amboð hjá einum snævurskygdum, ultrakonservativum og í mongum førum ómenniskjaligum hugburði. Hesin dómstólur, ið átti at verið fremsta verjan hjá smámanninum, tí útstoytta, teimum sjúku og neyðstøddu - og sum Jesus Pápi tók til sín og hjúkláði um - hann er nú bara eitt hent amboð hjá deyðarevsingarforsprákarum sum Bush.

Vit mugu seta okkara álit á stovnar sum Amnesty og á tey, sum boða kristniboðskapin við at síggja upp til Jesus og tað hann lærdi og minti okkum á, eitt nú dupulta kærleiksboðið, at tey halda fram við sínum menniskjaliga stríði ímóti deyðarevsingini. Tøkk til Amnesty fyri tykkara áhaldandi stríð fyri mannarættindum. Og tøkk til tey prædikufólk kring allan heim, sum vilja lata boðskap Jesusar um frið á jørð og í menniskjum góður tokki, í ein búnað, sum eisini er í samsvar við okkara tíð - 2000 ár eftir Jesus føðing.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Ummæli:

Útleiðing av veðurlagsgassi

A. Guttormur Djurhuus

Stutt undan jólum læt Heilsufroðiliga starvsstovan úr hondum, frágreiðing um útleiðing av veðurlagsgassi í Føroyum, í tíðarskeiðinum frá ár 1990 til 2001. Frágreiðingin varð gjørd eftir áheitan frá Oljumálaráðnum.

Føroyar hava átikið sær eina árliga fráboðanarskyldu, um hvussu stórt útlatið er av nøkrum ávísum veðurlagsgassløgum, til stovn undir ST.

Frágreiðingin er skrýdd við nógvum og litføgrum farstrikum og myndum. Greiningin millum gassløg og samfelagsbólkar er so umfatandi, at tú hevur lyndi til at villast í øllum smálutunum. Ein slík frágreiðing, til myndugleikarnar at nýta í teirra arbeiði, eigur at vera greið og eftirfarandi. Tað kann tíverri ikki sigast um hetta arbeiðið.

Málið í frágreiðingini er í støðum so vánaligt, at tað ger hana torskilda. Við hvørt noyðist tú at gita, hvør ið meiningin er. Fyri bert at nevna tað eina dømið. Talva 1 verður nevnd: "Gassið, ið Føroyar hava skyldu at fráboða UNCCC." Skal sjálvandi vera: "Gassløgini, o. s. fr.." Í sjálvari talvuni er síðani ein vavstur av føroyskum, donskum og grikskum heitum fyri tey ymsu gassløgini, sum fráboðast skal um. Sera óheppið.

Nógvir pástandir eru í tekstinum, ið lesarin ikki hevur møguleika at kanna eftir um hald er í teimum, tí at ongar keldutilvísingar eru. Aftast í frágreiðingini er tó ein listi við 9 heimildarritum. Ikki nakar ógvusligur listi. Í listanum er m. a. Stanley E. Manahan 1983: Environmental Chemistry, sum helst fyri ein part er avoldað.

Av faktafeilum sum eru beinleiðis sjónskir, sjálvt fyri ein leikmann, kunnu í hissini nevnast nakrir fáir.

Á síðu 8 stendur: "Stóra oljunýtslan í el-virkjum og húsarhaldum í Føroyum er tí atvoldin til, at býtið í útlatinum í Íslandi og Føroyum er ymiskt".

Skeivt. Munurin stendst av at íslendingar nýta so nógvan jarðarhita til upphiting av húsum.

Longur niðri á somu síðu stendur: "Útlátið frá húsarhaldum er lækkað við 13% og er lækkingin helst tengd at broytingini í lufthitanum".

Nei, men tí at húsini eru vorðin betur bjálvaði.

Á síðu 9 stendur: "Av tí at vatn verður víðkað við størri hita, má eisini roknast við, at vatnstøðan í høvunum fer at hækka".

Hækkingin av vatnskorpuni stendst í høvuðsheitum av at innlandsísarnir bráðna. Ískoytið frá at vatnið veksur í vavi, er bert marginalt.

Á síðu 16 stendur: "Útlatið av láturgassi í Føroyum stavar frá djórahaldum (44%), fiskiskipum (25%), akførum (10%) og húsarhaldum (7%)".

Í øllum hinum framkomna heiminum er høvuðskeldan til láturgass køvevnishandilstøð.

Á síðu 21 stendur sum tekstur til mynd 32: "Katalysatorar minka um útlátini av koliltu, nitrogeniltu og loftfimum lívrunnum evnum, men hækka um útlátið av láturgassi".

Í einum nýmótans katalytiskum eftirbrennara verður láturgassið reduserað til køvevni og súrevni.

Og at enda, á síðu 23 stendur: "Minking av koltvíiltuútlatinum frá ferðsluni kann fremjast við at seta katalysatorar í akfør, sum nýta bensin sum brennievni".

Tað reina møsn!

Í tekstinum verður útgangsstøðið, í samanberingini við ár 2001, altíð tikið har útlátið er lægst, í tíðarskeiðinum 1990 - 2001, og gevur tað sjálvandi fyri tað mesta ein ógvusligan vøkstur. Kreppuár vóru sum kunnugt fyrst í nítiárunum. Um útgangsstøðið var árið 1990, sum kyotosáttmálin sigur, er vøkstur lítil og eingin. Men tað hevði sjálvandi gjørt frágreiðingina minni gølukenda og harvið minni áhugaverda hjá fjølmiðlunum at válka sær í.

Ein týdningarmikil partur av eini slíkari frágreiðing til myndugleikarnar eigur at vera tilmæli um hvussu bøtast kann um støðuna. Har er einki at finna. Einki, bert atfinning og svartmáling. Tað nyttar lítið at pynta eitt solti innhald við litskrýddum myndum og grafum. Tað er bert hin fákunnigi lesarin sum letur seg villeiða av slíkum stakkalastási.

Spell at so týdningarmikil frágreiðing, umbiðin av myndugleikunum, er ónýtilig, í teirra arbeiði at tryggja okkum øllum eitt betri umhvørvi. Tað er eisini løgi at so ókvalifiseað arbeiði verður latið úr hondum, av teimum sum hava ábyrgdina av eftirlitinum við okkara umhvørvi, Heilsufroðiliga starvsstovuni. Av einum stovni sum kostar skattgjaldarunum tíggjutals miljónir av krónum.

Treytaleys umbering til Jógvan við Keldu

Av misgáum havi eg í grein í Sosialinum lagt Jógvan við Keldu undir líkt og ólíkt, hetta er sera óheppið, tá eg skuldi havt skriva Jógvan á Lakjuni. Mær vitandi hevur Jógvan við Keldu ikki úttalað seg um tey málini, sum eg viðgeri í greinini. Eg biði Jógvan við Keldu um umbering og vóni, at hetta mál ikki hevur órógva honum jólini.

Niels Uni Dam
Vættrastígur 6, kj.
FO-100 Tórshavn

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt
jonbrian@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo

Útróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

Rullandi redaktionin:
tel. 220507

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Friggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásetta freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Viðvíkjandi barnapeningi

Sofus Joensen

Hoyrdi nú herfyri, at landsins myndugleikar hava í hyggju at taka stuðulin av, sum vit pápar hava havt rætt til hesi seinastu árini.

Tað hevur verið soleiðis, at vit hava skula goldið fult gjald fyri hvørt barnið, og hetta hevur so verið prístalsviðgjørt við jøvnum millumbili! Síðani hava vit kunna søkt um at fáa helvtina aftur!? Hetta havi eg so gjørt hvørja ferð fyri at lætta um eina stramma økonomi!

Alt hetta hevur kravt eina øgiliga umsiting, tí tá eg havi verið á Almannastovuni fyri at søkja, so havi eg verið vístur runt í næstan øllum húsinum, fyri at fáa fatur á rætta viðkomandi! Og kvittanirnar skulu vit eisini leggja við, fyri at eingin misskiljing skal verða! Í mínum føri frá Toll- og skattstovuni! Eg má siga, at hetta hevur verið eitt øgiligt sirkus, hvørja ferð!!

Eg havi spurt, um tað ikki ber til bara at gjalda helvtina, fyri at lætta um umsitingina. Men tað hevur vístur seg at verða ómøguligt, tí landsins ,myndugleikar hava lóggivið soleiðis, at tað SKAL søkjast hvørja ferð!?

Og nú tykist tað fyri mær, at teir vilja leypa uppum, har garðurin er lægstur! Nevniliga við at taka allan møguleikan frá okkum pápum, til at skapa okkum eina framtíð við nøkurlunda figgjarligum karmum fyri eina nýggja familju, sum vit "uvegærligt" fáa okkum!!

Tað er soleiðis, at tá ein hjúnaskilnaður er vorðin veruleiki, so FÆR mamman børnini, við øllum frádráttum, ið har til hoyra, umframt at hon fær eitt mánaðarligt gjald frá gjaldstovuni, sum so pápin verður kravdur eftir frá somu stovu!! Meðan pápin "allernádigst" sleppur at síggja síni børn annað hvørt vikuskifti, umframt helvtina av feriuni!!

Nú halda fleiri sikkurt, at eg ljóði í avgjørdur, tá eg sigi at mamman FÆR børnini!! Tað eri eg eisini!! Eg havi spurt á hagstovuni, men har vóru eingi slík tøl at fáa hendur á!!? (Hví??)

So fór eg á ríkisumboðið, sum jú allir hjúnarskilnaðir fara ígjognum. Men har vóru heldur eingi slík tøl!!? (Hví??) Líkamikið, á Ríkisumboðnum fekk eg eitt langt og gott prát við eitt av starvsfólkunum, og har fekk eg at vita, at "det var en klar ubalance i fordelingen"!!!! (Hví??)

Tá eg lá í hjúnarskilnaði, fekk eg at vita frá mínum sakførara, at pápin skuldi prógva, at mamman var BÆÐI alkoholikari, stikknarkoman OG prostituerað, og allarhelst skuldi hon eisini bukað børnini!! Her skal sigast, at táverðandi kona mín fekst ikki við nakað av hesum!! Men hvør pápi hevur hug til at fara at niðurgera mammuna at børnunum hjá sær?? Tað er nakað, sum einans rakar børnini, UMFRAMT hjúnaskilnaðin!! So sigi mær, hvar er javnstøðan?? Tað einasta pápin skal gera "galið" er at hava eitt arbeiðið, sum forðar honum í at hava eitt 24 tíma samband við børnini hjá sær!!! So kunnu allar góðar kreftir tosa um "kvalitetstíð" og "kvantitetstíð", hatta gevi eg eina pappdunnu fyri!! Nú ljóði eg bittur, og tað eri eg kanska, men tað er einans inn á teir myndugleikar, sum kunna finna uppá at lóggeva so umhugsunarleyst, at tað stríðir ímóti allari javnstøðu!!

Nei góðu lóggevarar, nýtið hetta frálíka høvi til sparingar á øðrum frontum, har tað veruliga er brúk fyri tí!! Til dømis, at gera umsitingina á Almannastovuni meiri starvsfólka- og viðskiftafólkavinarliga, tí eitt skulu tit eiga, at landsins stovnar eru heilt ótrúliga strævnir at koma í holt við!!!! Tú mást næstan seta ein heilan dag av, fyri at koma til rætta viðkomandi, sum gjarna er so ovbyrjaður av arbeiði, at hann verður noyddur at leita í aðrar tveir dagar eftir einum skjali, sum tú skalt brúka her og nú, til dømis kvittanum uppá barna-pening, sum í mínum føri verð-ur kravdur gjøgnum skattin, og so hevur hann gloymt tað í øllum resinum!! So kunnu tit taka tað til tykk-um sum rós ella rís eftir egnum ynski!! Men latið okkum pápar fáa frið!!!!!

Aftursvar til Jákup Sólstein

– formann í Føroya Reiðarafelag, til skriv hansara: »Rættleiðing til Ellint Abrahamsen«

V/ Føroya Skipara- og Navigatørfelag
Ellintur M. Abrahamsen

Eg vil fyrst hervið afturvísa pástandin hjá Jákup Sólstein um, at Føroya Skipara- og Navigatørfelag við undirritaða sum formanni ikki heldur gjørdar avtalur.

Tá sáttmálasamráðingaranr vóru í 1999, varð avgjørt at orða sáttmálarnar so eins sum til bar. Tað komst av tí, at sáttmálarnir vóru so ójavnir í orðalagi og eisini innihaldi, men skuldu teir ávísu brúkast til sama veiðihátt.

Í tí sambandinum sótu øll manningarfeløgini saman fyri at samanskriva sáttmálarnar. Eg hugsi, tað var ein leygardag, sum tær endaligu semingsroyndirnar byrjaðu mánamorgunin eftir. Tá segði eg við semingsmenninar John Rajani og Niels Sørensen, at broytingarnar vóru so víttfevnandi, og spurdi, um tað ikki bar til at avtala, at um villur ella skeivar orðingar høvdu sníkt seg inn í sáttmálan, at tað so skuldi vera møguleiki fyri at rætta slíkar villur. Til tað svaraðu semingsmenninir, at tað kom ikki upp á tal, tí tá tað er undirskrivað, so er undirskrivað. Sáttmálin varð undirskrivaður 12. januar 1999.

Í skrivi, dagfest 4. februar 1999, kom sendandi ein broyttur sáttmáli frá semingsmonnunum. Víst var í tí skrivinum á, at áðrenn undirskrivað varð, varð avtalað, at um villur ella skeivar orðingar høvdu sníkt seg inn í sáttmálan, og hesar onki høvdu við samráðingarnar at gera, so skuldu hesar rættast aftaná undirskrivan.

Tann pástandurin varð sjálvsagt afturvístur av Føroya Skipara- og Navigatørfelag, tí vit í FSN høvdu onga avtalu gjørt um at rætta orðingar aftaná undirskrivan, men høvdu hinvegin fingið greið boð um, at tá tað var undirskrivað, so var tað undirskrivað.

Inntil leygardagin 21. desembur 2002 hevur undirritaði skilt tað soleiðis, at pástandurin hevur verið um, at tað vóru feløgini sínamillum, sum høvdu avtalað, at um villur ella skeivar orðingar høvdu sníkt seg inn í sáttmálan, og hesar onki høvdu við samráðingarnar at gera, so skuldu hesar rættast aftaná undirskrivan, men nú sigur Jákup Sólstein í Dimmalætting og Sosialinum leygardagin 21. desembur 2002, at:

"Hann (John Rajani) setti tí sum treyt fyri at enda semingina, at partarnir samdust um, at tað skuldi verða møguligt eftirfylgjandi at " rætta møguligar villur og skeivar orðingar" Hetta vóru allir partar samdir um, og so varð undirskrivað.

Eg vil gera vart við, at eg hvørki kenni til treytina frá Semingsstovninum ella havi gingið undir hana.

Eg havi heldur ikki góðtikið eina avtalu millum partarnar um, at um villur ella skeivar orðingar høvdu sníkt seg inn í sáttmálan, so skuldu hesar rættast eftir undirskrivan.

Tað mesta av tí sum Føroya Reiðarafelag kallar fyri villur ella skeivar orðingar, tað er eftir míni metan, hvørki villur ella skeivar orðingar.

Hóast vit í FSN halda fast við, at eingin avtala varð gjørd við FR um at rætta møguligar villur ella skeivar orðingar, so er í skrivi frá FSN til Semingsstovnin dagfest 19. februar 1999 sagt, at:

"Um so er, at Semingsstovnurin kemur til ta niðurstøðu, at sáttmálin er soleiðis orðaður, at ikki ber til at brúka sáttmálan við tí orðalagi, ið brúkt er, so verður Semingsstovnurin hervið biðin um at vísa á, hvat tað møguliga er.

Um so er, so vilja vit í FSN vera við til at viðgera eina slika møguliga villu."

Semingsstovnurin hevur ikki víst FSN nakrar villur, ið gera, at sáttmálin ikki kann brúkast við tí orðalagi, hann hevur. Tí var onki at tosa um.

Í FSN vóru vit so ósamdir við Semingsstovnin um tær rættingar, sum semingsmenninir vóru komnir við, at vit kravdu Semingsstovnin at taka tær aftur, men tað vildu semingsmenninir ikki. Vit vildu vera við til at ógilda undirskriftina, soleiðis at sáttmálin skuldi skrivast undir av nýggjum fyri at hava gildi, men tað vildu teir heldur ikki, hóast samskifti bæði í skrift og í talu.

Avgjørt varð tí at stevna Semingsstovninum, v/ John Rajani og Niels Sørensen, við kravi um, at teir, (semingsmenninir), vóru dømdir at viðurkenna, at teir ikki høvdu havt rætt til at gera tær broytingar, sum teir høvdu gjørt. Stevningin varð latin Føroya Rætti.

Semingsmenninir tóku játtandi til orðanna og sjólóðandi dómur varð sagdur í málinum:

"Tí verður dømt:
Stevndi, Semingsstovnurin v/ John Rajani og Niels Sørensen, skulu yvirfyri stevnda, Føroya Skipara- og Navigatørfelag viðurkenna, at semingsstovnurin ikki hevur havt heimild til at broyta ásetingarnar í sáttmálanum, sum undirskrivaður var millum Føroya Skipara- og Navigatørfelag tann 12.01.1999.

Joen H. Andreasen

Underskriftens rigtighed bekræftes.
Retten på Færøerne, den 10. maj 2001.

Eilen Vang,
kontorfuldmægtig"

Sostatt hevur semingsstovnurin viðurkent, at teir ikki høvdu heimild at gera rættingar í sáttmalanum, sum undirskrivaður varð 12. janur 1999. Dómur er eisini sagdur í málinum.

Tað vildi eisini verið ímóti øllum vanligum samráðingarsiði - og serliga tá Semingsstovnurin er uppi í samraðingunum-, um samráðingarpartar høvdu skrivað undir sattmála og síðani munnliga avtalaðu, at partarnir kunnu bara broyta skrivliga sáttmalan, um teir mettu, at okkurt var komið skeivt fyri. So hevði valdað fullkomin ruðuleiki á arbeiðsmarknaðinum. Tað minsta var, um broytingar skuldu gerast, at partarnir fyrst blivu samdir um broytingarnar og síðan skrivaðu undir gjørdu broytingarnar.

FR ikki so mikið sum bað um samráðingar við FSN um broytingarnar.

Um semingsmenninir høvdu rætt í tí, um teir søgdu var avtalað, so var eingin orsøk til at taka játtandi til orðanna um, at teir ikki høvdu rætt til at gera tær broytingarnar, sum teir høvdu gjørt, tí ein munnlig avtala er líka bindandi sum ein skrivlig. Treytin er tó, at avtalan er gjørd.

Um semingsmenninar John Rajani og Niels Sørensen havi eg bert at siga, at teir, ta tíð, eg havi verið við til samráðingar, eru teir bestu semingsmenn, FSN hevur havt til seming, men í hesum málinum meti eg, at teir fóru skeivir. Men tað, sum Jákup Sólstein sigur, at teir høvdu sett sum treyt fyri at enda semingina, tað skal eg ikki lasta teir fyri, tí tað veit eg einki um, at teir hava sagt.

Eg kann ikki hugsa mær, at semingsmenninir í dag pástanda, at treytin fyri at enda samráðingarnar var tann, sum Jákup Sólstein sigur, tí tað er ikki ein treyt, sum FSN var vitandi um og ei heldur er gingin undir.